# Sjálvsálitið eina tonn rætta vegin

*Sumbingar vóru órógvaðir av, at teir høvdu broytt uppstilling, og so vóru klaksvíkingar í stevnuhýri*



*Talan var um einvegis ferðslu í norðoyastevnudystinum, og neyåars sumbingarnir máttu fara heim aftur við stórtapi hangandi oman yvir sær*

**Mynd: JH**

Tað var stórur munur á. Fríggjakvøldið sá tað út til, at eingin landskappingardystur fór at vera norðoyarstevnudag. Sunnukvøldið frøddust teir á stevnuni um, at fótbóltsflaggskipið hjá norðoyingum hevði vunnið trý stig, og at teir høvdu bøtt málmunin, sum ikki hevur havt tað ov gott fyrsta triðingin av kappingini. Og harvið fekk sjálvsálitið hjá KÍ spælarunum eina tonn uppeftir.

Longu í 2. minutti setti Rógvi Jacobsen hol á, men tað var ikki fyrrenn í seinna umfarinum, at tað gjørdist greitt, at sigurin fór at verða sannførandi. Rógvi Jacobsen økti í 37. minutti.

Í báðum førunum í 1. hálvleiki var tað Heðin á Lakjuni í vinstru, sum hevði næstsíðsta fótin á. Rættulig ferð kom á skriðulopið, tá seinna umfarið bara var ein góðan minutt gamalt. Eftir horna og út frá aftur smekkaði Heðin á Lakjuni flatt millum vinir og fíggindar, so var 3–0, og so rullaðu málini ígjøgnum.

### At leggja merki til

Merkisvert var tað, at Jan Andreasen, sum var leikbannaður móti B36, ikki fekk kjansin aftur fyrrenn í 2. hálvleiki móti sumbingum. Tá loysti hann Kristian á Lakjuni av. Meinhard Joensen vardi KÍ málið eftir steðgin. Zoltan Kujundric fekk ein løst í 1. hálvleiki, og tað varð ikki hildið at vera ráðiligt, at hann helt fram.

Tað var eisini merkisvert, at tað endiliga eydnaðist jugoslavanum, sum klaksvíkingar vóna skal gerast nýggja álopsessið hjá teimum, at skora. Srecko Milicevic misnýtti fleiri ferðir í Gundadali móti B36, men hesa ferð eydnaðist tað. Eftir at Harley Bertholdsen hevði umsett úr ellivu metrum, tí Marek varð feldur, skoraði Srecko eftir innlegg úr vinstru, og so eftir at ein púra leysur Rógvi Jacobsen hevði trillað bóltin upp á tvørs.

Rógvi Jacobsen økti til 7–0, tá hann var púra leysur mitt fyri, og Heðin á Lakjuni skoraði til 8–0, eftir at innlegg var komið frá baklinjuni í vinstru.

Síðsta seymin slerdi Hjalgrím Elttør í. Ungi álopsmaðurin fylgdi upp og var fyrstur á, eftir at alt annað enn arbeiðsleysi Eigil Olsen í sumbiarmálinum í fyrstu atløgu hevði hálvbjargað.

Talan var allan 2. hálvleik um uppvísningsfótbólt hjá KÍ. Teir høvdu møguleikar at skora í hvussu so er fimtan mál, men tað tóktist sum áskoðararnir vóru nøgdir við 9–0.

### Tunnir sumbingar

Her býr eitt mergjað fólkaslag, syngja sumbingar í hypnosusanginum. At teir eru mergjaðir hava sumbingar so ofta víst – bæði í farnari tíð og í nútíðini.

Men á norðoyarstevnu vóru teir tunnir. Fleiri av føstu monnunum vóru ikki við, tí teir eru smáskaddir. T.d. sótu á beinkinum alla tíðina Eirikur Joensen og Sasa Tomajek – toppskjúttin sum býr í Klaksvík, har hann arbeiðir á Kósini.

René Thomsen kendi seg noyddan at taka seg burturúr longu miðskeiðis í 1. hálvleiki. Tað hevði fleiri umskipingar við sær, og tað toldi liðið ikki.

Tað hevur gingið væl hjá Sumba, tá Mortan úr Hørg og Bergur Vinther hava verið í miðverjuni. Hesa ferð hevði Milan Cimburovic sett nýggjar menn frammanfyri Marlon Kjærbo. Ætlanin tóktist vera, at Bergur Vinther í høgru skuldi byrgja fyri skjótleikanum hjá Heðini á Lakjuni, og at Mortan úr Hørg skuldi stríðast á miðvøllinum.

Spasojé í miðverjuni hevði stórar trupulleikar at fylgja Rógva Jacobsen, sum oftast var leysur í brotsteiginum. Rógvi skoraði beinanvegin til 1–0, og so líka sum duttu fyritreytirnar fyri sumbiar upplegginum á gólvið.

Mortan úr Hørg fekk als ikki ta nyttu úr sínum góðu fótbóltsevnum, sum hann ofta hevur fingið, tá hann hevur verið í miðverjuni. Har hevur hann megnað at fingið tak á bóltinum og spælt hann út frá. Hesa ferð sparkaði miðverjan, og so fingu teir bóltin beinanvegin aftur í høvdið.

Síðstu løtuna av fyrra umfarinum høvdu sumbingar tveir møguleikar at skora, men ellivu metrar úr málinum og mitt fyri misnýttu Tummas Jóhan Nónfjall og innskifti Jón Lisberg, og so sást ikki meiri til sumbingar í KÍ brotsteiginum.

JH

**KÍ-Sumba 9-0 (2-0)**

1-0: Rógvi Jacobsen 2.
2-0: Rógvi Jacobsen 37.
3-0: Heðin á Lakjuni 47.
4-0: Harley Bertholdsen (br.) 52.
5-0: Srcecko Milicivic 58.
6-0: Srcecko Milicivic 67.
7-0: Rógvi Jacobsen 70.
8-0: Heðin á Lakjuni 80.
9-0: Hjalgrím Elttør 85.

**KÍ:**

Zoltan Kujundric – Harley Bertholdsen, Amdrzej Pacek, Niclas Niclassen, John Ryan – Kristian á Lakjuni, Jan Joensen, Marek Wierzbicki – Screko Milicevic, Rógvi Jacobsen, Heðin á Lakjuni

**Sumba:**

Eigil Olsen – Bergur Vinther, Trygvi Nielsen, Marlon Kjærbo, Spasojé Biberdzic, Tummas Jóhan Nónfjall – Jan Poulsen, Hans Jákup Thomsen, Mortan úr Hørg, Hallur Dam Joensen – René Thomsen

# HB vann á norðoyastevnu

*2. deild: Klaksvíkingar vóru í stevnuhýri og gjørdu tvey sjálvmál*

Jákup Mørk

Klaksvíkingar, sum hava hildið málið reint farnu tríggjar dystirnar, lótu hesa ferð trý mál fara inn, og teir høvdu sjálvir seinasta fótin á tveimum teirra.

HB var á vitjan í Klaksvík leygardagin, og norðoyastevnudysturin, sum eisini var steypadystur, endaði við 3-2 sigri til havnamenninar.

KÍ meira spæl og kjansir fyrra hálvleik, men tað var HB, sum fekk einasta málið. Hetta málið kom beint fyri hálvleiksstegðin. Klaksvíkingar vóru passivir í verjuspælinum, og so kom ein HB'ari ímillum og sendi bóltin fram við málverjanum og tveimum verjuspælarum. Á veg í málið fekk ein av verjuspælarunum hjá KÍ bóltin aftur, men hann varð trýstur av Eyðuni Samuelsen, og sendi bóltin í egið mál.

KÍ hevði frammanundan havt onkur tilboð. Tvær ferðir vóru teir nær eftir hornaspark, og Atli Danielsen og Eyðun Klakstein høvdu eisini royndir.

HB dúvaði upp á skjótu áslopsmmenninar, Gunnar Mohr og Eyðun Samuelsen, men teir komu betur til sín rætt í seinna hálvleiki enn í fyrra hálvleiki.

### Aftur og fram

Eftir hálvleikssteðgin gekk spælið nógv aftur og fram. KÍ legði meira fyri fram eftir vøllinum, og tað gav eisini HB-spælarunum pláss, tá teir fóru í álop.

Stutt eftir steðgin javnaði KÍ, tá Tomislav Sivic sendi upp um HB-verjuna. Eyðun Klakstein tamdi fram við einum verjumanni og sendi bóltin í málið.

Men KÍ-arnir vóru ikki komnir yvir málið, tá Gunnar Mohr legði HB fram um 2-1. Hetta hendi eftir álop í vinstru síðu, og Gunnar var fyrstur á innlegginum við fremru stong.

KÍ javnaði aftur, tá Tomislav Sivic varð spældur leysur, og hann sendi bóltin fram við HB-málverjanum og í málið til 2-2.

Bæði KÍ og HB høvdu eftir hetta onkra naska roynd, men tað gjørdist heimaliðið, sum skoraði seinasta málið. Tíverri fyri klaksvíkingar var tað í egið mál. Bólturin varð lagdur inn fyri úr høgru síðu, og við tætt inni við málið, rakti hann ein KÍ-verjuspælara og endaði í meskunum.



*Gunnar var aftur millum málskjúttarnar i Klaksvík*

***mynd: Jonhard Hammer***

3-2 til HB, sum við sigrinum fóru fram um KÍ. Klaksvíkingar liggja nú aftast í 2. deild, men at døma eftir dystinum leygardagin, eru teir einki verri enn hini liðni, teir kappast við í niðaru hálvu av deildini. Teir skulu bara skora fleiri mál í rætta endanum.

KÍ-HB 2-3 (0-1)
0-1: Sjálvmál
1-1: Eyðun Klakstein
1-2: Gunnar Mohr
2-2: Tomislav Sivic
2-3: Sjálvmál



*Svimjarar og rennarar úr Føroyum fingu stórfingna móttøku, tá tey í gjár komu aftur úr kappingum í ávíkavist Bretlandi og Hallandi*

**Mynd: Jens K. Vang**

# Komu aftur í gjár

Seiansta vikuna ella so hava menningar- og rørslutarnað ítróttafólk verið í ávíkavist Hollandi og Onglandi, har tey hava luttikið í ítróttakappingum í svimjing og renning.

Úrslitini vóru í fleiri førum framúr góð, og beint fyri evstamark í gjár var móttøka hildin í ÍSF húsinnum, har millum annað ÍSF forsetin, Heðin Mortensen helt røðu fyri teimum.

Meira verður at frætta í blaðnum í morgin



# Kurt Mørkøre helt norðoyarstevnuna

*Noreg: Hans Fróði sat á beinkinum og sá landsmenninar skora fýra mál í tíggju minuttir, tá Sogndal vann 4–2 á útivølli*



*Kurt Mørkøre, sum á myndina sæst skjóta KÍ í steypafinaluna í fjør, var tríggjar ferðir á rætta staðnum um vikuskiftið*

Kurt Mørkøre sendi eina fína norðoyarstevnuheilsu heim til Klaksvíkar sunnukvøldið. Sogndal spældi á útivølli móti Strindholm, sum ikki hevur staðið seg serliga væl higartil.

Sogndal vann 4–2. Teir vóru á odda 2–0 í steðginum, og teir øktu til 4–0, áðrenn teir tóku sær av løttum og heimaliðið tvær ferðir slapp at pynta um.

Hans Fróði Hansen var á beinkinum allar 90 minuttirnar. Hann venur dúgliga, men tað gongur striltið hjá honum at endurvinna plássið í miðverjuni, sum hann misti, tá óstbeinið brotnaði fyri góðum tveimum mánaðum síðani.

– Kurt Mørkøre og Julian Johnsson vóru høvuðsleikarar upp á tann máta, at teir skoraðu øll fýra málini. Julian fekk tað fyrsta seks minuttir undan steðginum. Tað var eitt fínt mál. Hann sneiddi framvið einum verjuspælara og framvð málverjanum, áðrenn hann legði bóltin í málið, sigur Hans Fróði Hansen.

Miðverjin er av álvara farin at ótolnast. Hann heldur venjingarstøðuna vera nóg góða til 1. deildarfótbólt, men higartil hevur venjarin ikki vilja givið honum møguleikan. Úrslitini hjá Sogndal hava annars ikki verið nakað at reypa av. Teir eru á fimta plássi, men teir eru níggju stig aftanfyri oddaliðini Lyn og Strømgodset.

### Besti maður

Norðoyarstevnuavrikið hjá Kurt Mørkøre var í norska blaðnum Verdens Gang mett at vera tað besta í dystinum. Kurt Mørkøre lúrdi alla tíðina á linjuni til rangstøðu, meðan Julian Johnsson rann og tuskaði so nógv, sum hann altíð ger.

VG skrivar, at Sogndal menninir vóru sterkir í nærdystunum, teir høvdu betri bóltførleika enn mótstøðumenninir, og spælskilið hjá teimum var betri.

Kurt skoraði til 2–0 í evstu løtuni undan steðginum, og góðar fimm minuttir seinni hevði hann gjørt hattrikk.

VG man ikki hava sæð persónnummarið hjá Kurt Mørkøre. Í umrøðuni av dystinum kalla teir hann fyri unggutten úr Føroyum. Bæði Hans Fróði Hansen og VG hava á orði síðsta málið, sum Kurt Mørkørre fekk:

– Hatta var eitt typiskt Kurt mál. Hann var kroystur, tá hann við bakinum móti málinum tamdi bóltin, snaraði runt seg sjálvan og smekkaði so úr átjan metrum og upp í málhornið, sigur Hans Fróði Hansen, og hetta er tað sama, sum stendur at lesa í VG.

2. hvítusunnudag skulu føroyingarnir í Sogndal aftur í eldin. Tá fáa teir á heimavølli vitjan av Strømgodset, sum er næstovast.

Í Noregi hevur ikki verið nakað serligt summar tær síðstu vikurnar. Í gjár var summarveður, og veðurmaðurin segði frá summarveðri fram móti hvítusunnu.

JH



*Tá VB í gjár helt føðingardag, høvdu bæði leikarar og viðhaldsfólk alla orsøk at fegnast*

**Mynd: Áki Bertholdsen**

# Føðingardagsgáva

*GÍ mátti taka til takkar við greiðum tapi suðuri í Vági, har leikararnir dagin fyri føðingardag felagsins kundu geva felagnum trý stig*

Jákup Mørk

Eftir stórtapið í fyrru hálvfinaluni móti HB, vóru tað mong, sum hildu, at vágbingar vóru um at missa ondina í dystinum um at koma upp á fótbóltstindarnar.

Liðið hevur annars í fleiri dystum í ár prógvað, at eingin skal rokna við einum løttum dysti, tá VB stendur hinumegin, men veikleikarnir, sum so dyggiliga vórðu avdúkaðir dýra biðidag, tóktist fyri mong at vera ov stórir til at liðið veruliga kundi gera seg galdandi.

### Fingu vaskað sær

Sunnudagin høvdu leikarar og venjari so høvi til at vaska tapið av sær, og hesum møguleika tóku teir eisini av.

Ikki tí, mótstøðan tóktist á pappírinum at vera rættuliga stór. GÍ hevur meira enn nakað annað lið verið »felagið« í føroyskum fótbólti seinasta tíggjuáraskeiðið, men hinvegin hava greiðar ábendingar verið um, at gøtumenn ikki longur eru eins sterkir, sum teir hava verið.

Avrikið hjá gøtumonnum sunnudagin í Vági boðaði heldur ikki frá, at liðið er um at finna farna styrki fram aftur. Spælið sum so var als ikki á nóg høgum støði, og tá heimaliðið hinvegin tóktist rættuliga ágangandi, so var rættuliga skjótt, at trupulleikar stungu seg upp í GÍ verjuni.

Serliga í høgra verjuborði var illa statt, har Pól Ennigarð fleiri ferðir kom í undirtal, og tað var í tveimum slíkum førum, at vágbingar fingu lagt seg á odda.

Fyrru ferðina varð tað Tórður Holm, sum var fyrstur á einum innleggi, og nakað seinni var leikandi venjarin, Krzystof Popzynzki, sum var fyrstur á bóltinum.

Líkt var til, at heimaliðið nú hevði tryggjað sær ein avgerandi fyrimun, men seinastu tíggju minuttirnar av fyrra hálvleiki fekk GÍ aftur skapt spenning um dystin.

Fyrst sendi Súni Olsen eitt fríspark beinleiðis í málið, og beint fyri steðgin eydnaðist Paula Jarnskor at senda bóltin upp um Bjarna Johansen, sum kanska stóð dekan ov uttarlaga.

### Byrjaðu á berum

Vágbingar vóru sostatt noyddir at byrja at kalla á berum, tá teir komu út til seinna hálvleik, men tað gekk tó ikki leingi, so høvdu teir endurvunnið leiðsluna.

Aftur hesu ferð var tað í vinstra borði at vágbingar leiktu seg ígjøgnum. Bólturin varð sendur inn fyri, og har kom altíð vandamikli Jón Pauli Olsen og setti høvdið á bóltin, so VB nú aftur var á odda. Tíggju minuttir seinni var tað aftur leikandi venjarin, sum var seinastu á innleggi, sum var bryggjað eftir júst somu uppskrift sum 3-2 málið.

Tað gingu tó ikki meira enn tíggju minuttir, so vóru gøtumenn aftur upp á spæl. Eins og Pauli hevði gjørt í fyrra hálvleiki, so sendi Helgi L. Petersen eitt høgt skot upp um Bjarna í málinum.

Verjusíðan høgrumegin var tó enn ikki tett hjá gøtumonnum, og eftir at VB enn einaferð kom ígjøgnum í síðuni, kundi Jón Pauli enn einaferð nýta ytru síðuna av heysinum til at senda bóltin inn um Sunnvard í gøtumálinum.

### Fegin og ikki

Leikandi VB venjarin, Krzystof Popzynzki, var sum vera man fegin um sigurin. Serliga fegin tóktist hann tó vera um, at liðið megnaði at reisa seg eftir lemjandi tapið hósdagin.

- Undan dystinum í dag tosaðu vit ikki so nógv um taktik, sum vit annars plaga at gera. Vit tosaðu bert um at vinna dystin, og eg eri sera fegin um, at allir leikararnir gjørdu sítt til, at vit náddi hesum málið, sum samstundis er ein framskundað føðingardagsgáva til felagið, segði venjarin eftir dystin.

Hann fýltist tó á, at heimaliðið lovaði gestunum inn aftur í dystin, eftir at hava verið á odda við tveimum málum, men sigurin kom so kortini í hús, og hetta helt venjarin vera tað týdningarmesta.

Starvsfelagið hansara, Johan Nielsen, tóktist hinvegin ikki so fegin um avrikið hjá sínum monnum. - Vit spældu illa, og VB sigurin var eisini uppiborin, helt Johan fyri eftir dystin.

Um ikki annað, so hevur hann helst fingið hugskot til komandi venjingar burtur úr dystinum á Eiðinum sunnudagin.

Høgra verjuborð er alt ov viðbrekið, og hendan trupulleika má og skal tað helst gerast okkurt við. Í øllum førum kann tað ikki vera annað enn hugvekjandi, at mótstøðuliðið fær fimm mál eftir somu uppskrift.

**VB-GÌ 5-3 (2-2)**

1-0: Tórður Holm 7.
2-0: Krzystof Popzynzki 14.
2-1: Súni Olsen 33.
2-2: Pauli Jarnskor 44.
3-2: Jón Pauli Olsen 58.
4-2: Krzystof Popzynzki 68.
4-3: Helgi L. Petersen 78.
5-3: Jón Pauli Olsen 90.

Dómari: Súni Johansen

**VB:**

Bjarni Johansen - Predrag Zivkovic, Janus Kjærbo, Eyðun Jacobsen, Magni Jacobsen - Palli Augustinussen, Tórður Holm, Jón Gærdbo, Jón Pauli Olsen - Krzystof Popzynzki, Robert Cieslewicz

**GÍ:**

Sunnvard Joensen - Pól Ennigarð, Bartal Eliassen, Martin Thomsen, Leivur Hansen - Magni Jarnskor, Súni Olsen, Pauli Jarnskor - Rúni Justinussen, Helgi L. Petersen, Henning Jarnskor